## VIÐMERKINGAR

# U-landshjælp

**Hans Jensen, Hvalvík**

Det var med velbehag man forleden sad tilbagelænet foran fjerneren og stoppede konfekt i munden, medens fire noble, velklædte politikere udviklede deres intelligente meninger om, hvorledes vi skal hjælpe de underernærede, AIDS-ramte mennesker, der lever under ubeskrivelige forhold i vores perfekte verden.

Regeringens udspil lyder tilforladeligt: vi skal sætte ind, hvor vi har eksperticen - i fiskeindustrien. bortset fra, at der er en tvivlsom myte, så er vi her virkelig gode. Den færøske model vi skal eksportere til Chile, må vel så indeholde:

- kamufleret statsstøtte
- at nogle få skal eje retten til hele havområdet
- at alle lukker øjnede for overfiskeri
- at der legalt svindles med fiskericencur
- at man lander torsk som makrel i Scotland
- markedskræfterne sættes ud af kraft
- fisken skal landes på Færøerne, hvor vi ikke er konkurrencedygtige
- o.s.v.

Kapitalisterne i Chile har noget at se frem til. Regeringens andet argument er: Hjælp til selvhjælp! Her er jeg ubetinget enig - vi skal nok klare at hjælpe os selv så meget som muligt, hvis vi under dække af humanitær hjælp kan få fingrene i de rige fiskebanker i Chile.

Nej, - her må jeg sige med Høgni Hoydal - lad os hjælpe her, hvor vi er eksperter - ikke fiskeindustrien - med Sundheds- og Undervisningssektoren: Inden for sygehusvæsenet kunne vi lære analfabeterne meget f.eks.:

- Hvorledes kompetancestridigheder kan sabotere ethvert fornuftigt samarbejde.

- Hvorledes man ved genial stædighed spreder resourserne ud på små lokale sygehuse, og dermed med stolthed acceptere middelmådighed og hånligt afviser professionelle løsninger.

- Hvordan man her og nu sjusser sig til halve løsninger, der lukker munden på folk for en tid.

- Hvordan man politisk er for skvattet til at tage upopulære afgørelser.

Jo - her er noget at lære.

Og undervisningssektoren.

- masser af små skoler, hvor man underviser i basale ting som købmandsregning. Luthers lille Katekismus og Kristendom.

- Et meget rentabelt system, hvor lærerne om ikke er i overtal, så i bedste fald en elev og en overlærer.

- Masser af tilbud til børn med specielle vanskeligheder, sociale problemer, læsevanskeligheder o.s.v. - lige noget for de opsvulmede maver i Afrika.

Men der er masser af andre ting vi er gode til:

- Almannastovan er jo et klassiskt eksempel på et velfungerende Kafka's system - hvor man via indviklede omstillingssystemer - får sluset klienten diskret ud af systemet. Klarer han udfordringen bliver han til gengæld ofte forgyldt for sin ihærdighed.

- Postvæsenet - genialt.

- Infrastrukturen - uforlignelig. Borer vi flere huller nu - er der fare for at øerne synker.

- Hepotisme.

Jo, - Høgni har fat i noget at det rigtige, men min favorit er nu alligevel Jenis - han vil ikke skelne til religion i sin velgørenhed, - helst vil han hjælpe muslimer og andre vantro. Jeg går ud fra, det er efter den irske model under den store Hungersnød. De protestantiske godsejere udleverede gratis suppe til de katolikker, der konverterede. Se - det er en holdning, der er til at forstå.

Men inden vi nu svømmer helt over i selvglad godgørenhed - må vi selvfølgelig have løst vore egne store sociale vanskeligheder. F.eks. kan der ikke komme kørestole ind på det Gamle Apotek, så borgerne kan vederkvæges af de folkevalgtes guldkorn.

Dette og andre lignende, påtrængende problemer må løses først, inden vi får råd til at give en krone væk.

# Ókeypis buss-samband á Kambsdal

**Mark Joensen**



Stór umbering til Elin Hentze (Norðurlandahúsið), tónleikabólkarnar The Royal Highness v.fl., Páll Finnur Páll, og the Dreams, fyri mína manglandi konsentratión viðv. Konsertini á Kambsdali 17. desember

Í eini roynd at veita okkara ungu trygdargóða ferðing til og frá áðurnevndu konsert, varð eg rættiliga tikin á bóli, tá ið starvsfólk frá Kunningarstovuni fríggjadagin tann 16. desember ringdi og bað um fleiri atgongumerki, tí at tey vóru útseld og gravgangur var.

Eg skilti ikki rættilga hetta, tí mikudagin ringdi eg oman, fyri at kanna, hvussu nógv atgongumerki vóru seld, tí tað var lýst á plakatum og á Portalinum við at: »keypir tú atgongumerki áðrenn 14. desember (tvs. týsdagin 13. desember) koyrir tú ókeypis úr og aftur til Havnar«.

Niðast á plakatuni stendur tíðiliga, so eingin misskiljing skuldi vera »Avmarkað pláss«.

Mikudagin fekk eg at vita, at tey høvdu selt 6 atgongumerki, so tað varð í sjálvum sær ikki ein torfør uppgáva at loysa. Trupulleikin sum so tekur seg upp er tann, at Kunningarstovan heldur áfram at selja atgongumerki aftan á 13. desember tvs. bæði mikudagin, hósdagin og fríggjadagin, og tað bleiv gjørt, tí tey ikki fingu fatur á mær fyri at spyrja, um tey kortini skulu halda áfram at selja atgongumerki og tóku tískil sjálvi eina avgerð, greiður starvsfólkið mær frá (fríggjadagin).

Sjálvur helt eg tað vera rímuligt, at eg skuldi gera mítt til, at tey sum kortini høvdu keypt sær atgongumerki til konsertina fingu fart (eisini sjálvt um tey ikki høvdu rætt til ókeypis ferðing).

Eg ringdi síðani til teir sum vanliga taka sær av náttarbusskoyringini, Quickbusskoyring V/Bjarna Clausen og eg greiði gjølla frá, hvussu støðan er. Teir vátta fyri mær, at tað er í lagi og skulu tryggja mær, at tríggir bussar fara at standa klárir og taka ímóti fólki (120 sitandi tils.)

Í góðari trúgv kann eg nú fara avstað til Kambsdal og leggja mína orku í at veita eina vónandi góðskugóða og yrkisvenda konsert.

So vil eg annars brúka hetta høvi at heita á Tórshavnar kommunu at syrgja fyri, at ungdómurin fær eitt hóskandi stað til konsertir v. m.

Tað munnu vera sera nógv foreldur, sum geva mær viðhald í at lata ungdómin fara út á landsvegirnar í vandaferð fyri at kunna stuttleika sær í tónleikinum er púrasta burturvið. Og um so skal vera, haldi eg at tað er upp á sítt pláss, at Tórshavnar kommuna skipar fyri, at nøktandi og trygdargott bussamband er í lagi fyri at tryggja okkum foreldur, at tey ungu sum jú eisini eru borgarar í kommununi, fart.

Tað er als ikki ein løtt uppgáva at nøkta tørvin hjá einum tannáringi, má ásannast, men eg haldi tað vera sera mentunarliga fátæksligt, at høvuðsstaðurin ikki kann hýsa ungdóminum v. fl. innivist undir umstøðum, sum eitt nú t. d. í Mentanarhúsið í Fuglafirði.

Ein av orsøkunum til at Norðurlandahúsið setti seg í sambandi við meg (er mín áskoðan) viðv. samstarvi, er tí at tílíkar konsertir ikki júst eru egnaðar at hava í Norðurlandahúsinum, sjálvt um ljóð og ljósviðurskifti og útgerð neyðvan kann fást betur.

Í Norðurlandahúsinum og Mentanarhúsinum í Fuglafirði eru fastar ljóð og ljósinnstallatiónir, og tað lættir sjálvandi ómetaliga nógv um, tá ið tiltøk og konsertir eru.

Skal man við einum »mobil P. A. ljóð og ljos anlegg« hava konsertir í eini ítróttarhøll, sum frá fyrstanni tíð als ikki eru tilætlað og tillagað nútímans ljóð og ljósútgerð, skal tað ikki nógv til at okkurt gongur gali.

Viðv. konsertini í høllini á Kambsdali, so sluppu vit ikki inn í Høllina fyrr enn kl. 16:00, og longu har byrjaðu »trupulleikarnir« leygarkvøldið.

»Húsini« kunnu kanska hava 14 dagar til 3 mán. + 6 til 10 fólk at gera ljóð, ljós og pall til tílíka konsert sum tann á Kambsdali, og kann gera tað einsamallur upp á nakrar tímar, og kortini leverað »Vøruna«.

Men rætt skal vera rætt, eg megnaði ikki mína uppgávu leygarkvøldið.

Og til tín, Lillian Holm Mortensen, tá ið man fer so langt sum at fara í ÚF um stórmálið áljóðandi kr. 130,- so má tað hava nógv at siga hjá tær at koma til (mín)i tiltøk, tað eri eg sera harmur um, men eg vóni við hesum, tú hóast alt hevur fingið loyvi til at hoyra, hvussu ein onnur síða av sakini er.

Tá eg nevni »onnur síða av sakini«, eri eg sera ovfarin av, at Jógvan Jespersen, stjóri í ÚF, loyvir tílíka "negativa" útstilling av navni, uttan at viðkomandi hevur fingið loyvi at gera viðmerkingar. Sjálvur haldi eg, at øll skulu hava ein møguleika í samfelagnum, so eg kann ikki rættiliga ímynda mær, at Jógvan Jespersen hevur sagt, at júst hesin skal ikki koma til orðana.

Ikki tí, eg haldi tað er sera demokratiskt, at ein 16 ára gomul genta kann kæra sína neyð um kr. 130,- í eini seriøsari tíðindasending nakrar fáar tímar aftan á, at viðkomandi tannáringur føldi seg skeivt viðfarnan, og tað er hóast alt eisini vónandi við til at seta ein dialog í gongd um,, hvussu út av lagi vánalig støðan er hjá teimum ungu, sum eg fyrr havi nevnt. Tað frøist eg sjálvandi um, men eg haldi ikki, at hatta var rættur framferðarháttur, í hvussu so er skal tað vera »ordiliga« demokratiskt, Jógvan.

Annars vil eg ynskja øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

---

*Framhald av síðu 11*

vera upp til arbeiðsgevaran at gera av, um hann ger nýtslu av einum útlendingi, ella heldur tekur ein dana/føroying framum? Tað er jú sólarklárt, at ein føroyskur arbeiðsgevari undir vanligum umstøðum helst tekur føroyingar framum útlendingar (sjálvandi!), um so er, at føroyingar eru tøkir og kunnu fremja líka gott arbeiði, sum útlendingar. Men um arbeiðsgevarin álíkavæl vil hava ein ávísan útlending framum onkran tøkan føroying, so roknar hann uttan iva við at fáa meira gagn av hesum útlendinginum, enn einum føroyingi – og eingin lóg skal forða honum í hesum!

Hetta er bert vanligur logikkur, tá ið vit hugsa um arbeiðs- og marknaðarviðurskifti í einum og hvørjum landi.

Hví skulu útlendingar, eins og trælir, bert bindast at einum konkretum arbeiðsgevara og ikki kunna skifta millum arbeiðspláss og vinna sær pening til dagligt breyð her ella har, tá ið tey álíkavæl megna at forsyrgja sær sjálvum og arbeiðsgevarar hava brúk fyri júst teimum? Hesi eru jú samfelagnum til onga fíggjarliga byrðu. Tvørturímóti, tey gjalda sín skatt, eins og øll onnur. Ella um ein útlendingur er arbeiðsleysur í eina tíð men kortini hevur nokk av pengum fyri at klára seg og gjarna vil búgva í landinum – hví skal ein slíkur blakast út? Hann sýgur jú ikki nakað úr landskassanum, heldur rindar fyri at vera her við at keypa mat og samfelagstænastur…

Landsstýrismaðurin í innlendismálum kann sjálvandi siga – soleiðis er jú lógin og vit mugu fylgja henni. Men lógirnar eru til at broyta, tá ið einhvør klárthugsandi persónur kann síggja, at nakrar teirra á útlendingaøkinum eru – snøgt sagt – ótíðarhóskandi og hoyra heima í fornum øldum, tá ið trælahald var ein gerandiskostur.

Ein annar spurningur er - hví skulu vit yvirhøvur síggja Danmørk og Føroyar sum tvey ymisk útlendingamálsøki, tá ið hvørki løgreglan ella útlendingamálið í Føroyum eru yvirtikin av føroyskum myndugleikum og øll útlendingamálini í Danmørk og Føroyum álíkavæl eru formliga avgreidd av somu embætisfólkunum á Útlendingastýrinum í Keypmannahavn? Fyri útlendingar í Føroyum merkir hetta bert, at tey skulu ígjøgnum uppaftur longri bíðutíð og fleiri "avgreiðslumyllur", enn útlendingar í Danmørk, og at myndugleikarnir bæði í Havn og í Keypmannahavn kunnu kasta ábyrgdina av "føroyskum" útlendingum hvør frá øðrum.

Á heimasíðuni hjá Danska Útlendingastýrinum stendur at lesa:

"…Mål 2.2: Sagsbehandling af ansøgninger om arbejdstilladelse uden for positivlisten… Vedrører ansøgningen arbejde uden for positivlisten, vil den blive behandlet inden for 2 måneder, hvis alle oplysninger er medsendt fra starten, og hvis ikke særlige kontrolhensyn gør sig gældende..."

Positivlistin umfatar serlæknar, granskarar og onkur onnur størv. Útlendskir umsøkjarar til slík størv kunnu vænta sær avgreiðslutíð innan ein mánað. Øll onnur fáa svar frá Stýrinum uppá umsóknir sínar um í seinasta legi tveir mánaðir. Her er ikki talan um átta, tólv ella sekstan mánaðir, sum onkur útlendingur í Føroyum var noyddur til at bíða…

Tvær loysnir kunnu vera, fyri at fáa enda av hesum ruðuleikanum. Antin er útlendingamálið 100% yvirtikið av føroyingum – heldur í dag, enn í morgin. Ella tvørturímóti - alt føroyska útlendingamálið, sum tað er, verður yvirlatið Danska Útlendingastýrinum, sum lovar avgreiðslutíð uppá í mesta lagi tveir mánaðir. Kanska kundi ein føroyskur fulltrúi sitið á Útlendingastýrinum í Keypmannahavn við umsóknum úr Føroyum, sum neyvan eru so ómetaliga nógvar í tali, at ein embætismaður ikki megnaði at avgreiða tær skjótt og skilagott. So hevði Føroya Landsstýri spart fitt av peningi og orku uppá útlendingamálið.